Bilar

Nr. 156 • hósdagur • 19. august 2004 • 78. árg.



*Linjurnar eru nakað fyri seg og í besta Audi-stíli. Bilurin er sera rúmligur og viðførisrúmið er 546 litrar*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Audi A6 er ein smartur og framkomin luksusbilur við sportligum designi*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Audi A6 2,4 V6:

# Smartur og framkomin luksusbilur

**Audi A6 er ein smartur og framkomin luksusbilur við sportsligum designi. Bara ljóðið frá V6 motorinum við tveimum útstoytsrørum er ein uppliving í sær sjálvum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Audi A6 er nú komin til landið. Tað er dugnaligi designstjórin hjá Audi, Walter da Silva, sum hevur teknað bilin. Talan er um ein sera smartan og framkomnan luksusbil við sportligum designi, sum í støðd er millum Audi A4 og tann størsta A8.

Nýggi Audi A6 er ein háteknologiskur bilur, har nógvir av lutunum eru úr aluminium.

A6 er fyrsti bilur sum hevur MMI (Multi Media Interface) sum standard. MMI er ein framkomin telduskipan við einum skíggja í instrumentborðinum við nógvum ymiskum funktiónum, sum verða stýrdar av einum knøtti í gardanboksini. Til dømis verður fløguspælarin, sum er í handskarúminum, stýrdur við MMI systeminum.

## Elektromekaniska hondbremsu

Hondbremsan er elektromekanisk, sum aktiverast við eini kontakt í gardanboksini og loysnar automatiskt, tá bilførarin setur í gir og nemur spitaran. Bilurin startar bert um koblingspedalurin er inni.

Elektrohydrauliska servostýringin tillagar seg ferðina og er sera løtt at arbeiða við til býkoyring, hon verður síðan tyngri og fastari, so hvørt sum ferðin veksur. Undirvognurin er sera framkomin, og koyrieginleikarnir eru heilt í topp.

Málið hjá Audi er, at A6 skal vera leiðandi í sínum klassa.

A6 fæst við fimm ymiskum motorum, trimum bensin og tveimum diesel. Bensinmotorarnir eru: 2,4 litur V6 við 177 hk, 3,2 litur V6 FSI við 255 hk og ein 4,2 litur V8 við 335 hk. Dieselmotorarnir eru: 2,0 litur TDI (4 syl.) við 140 hk, 3,0 litur V6 TDI við 225 hk.

Sum eykaútgerð fæst A6 við Xenon-lyktum, sum snara við tá bilførarin snarar rattinum. Bilurin er sera rúmligur og viðførisrúmið er 546 litrar.

Prísirnir á Audi A6 byrja við 418.000, og tann sum vit royndarkoyrdu kostaði 438.000.



*Audi A6 innan. Leggið til merkis trapez-líknandi búmerkið í rattinum. Multi Media Interface (MMI) er standard í nýggja A6*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Audi A6 2,4 V6

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,4 litur V6 við 177 hk |
| 0-100 km/t | 8,9 sek. |
| Bensinnýtsla | 10,0 - 10,3 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/60-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 491,6 cm |
| Breidd | 185,5 cm |
| Hædd | 145,9 cm |
| Eginvekt | 1525 kg |
| Viðførisrúm | 546 litrar |
| Prísur | kr. 438.000 |
| Søluumboð | Bilasølan v. Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 315354<br>www.audi-vw.net |





*Ford V8 brandbilurin og Ford V10 ambulansan sum komu við Norrønu fríggjamorgunum. Á myndini eru f.v.: Olaf í Garði Joensen, sløkkiliðsleiðari hjá Eiðis kommunu, Fríðálvur Bláhamar, sum umboðar MT Bilar í Føroyum, og dótturin Unn, Sigurjón Magnusson, stjóri á MT Bilum , og Tórmóður Sigurðsson, frá MT Bilum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Brandbilur til Eiðis og ambulansa til Vestmanna

**Fríggjadagin 13. august komu tveir neyðsendarbilar við Norrønu úr Íslandi. Annar var ein nýggjur brandbilur til Eiðis kommunu og hin var ein ambulansa frá 1997, sum áður hevur koyrt í Reykjavík**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fólk frá MT Bilum á Ólavsfirði í Íslandi komu fríggjamorgunin við tveimum neyðsendarbilum til Føroya. Einum nýggjum Brandbili til Eiðis kommunu og einari brúktari ambulansu til Vestmanna Sløkki- og Bjargingarfelag.

Brandbilurin er amerikanskur Ford F550 V8 diesel við 270 hk, sum er uppbygdur hjá MT Bilum. Bilurin er ein 4x4 við hátrýstpumpu, 2000 litur vatntanga og 75 litur skúmtanga. Pláss er til 6 fólk í bilinum, harav tveir roykkavarar.

Bilurin er av sama slag sum teir hja Vestmanna og Kvívíkar kommunu.

Fyrimunurin við bilum í hesi støddini er, at teir eru kvikir, effektivir og bera vektina væl, og teir taka ikki so nógv pláss á smølu gøtunum inni í bygdunum, sigur Fríðálvur Bláhamar í Vestmanna, sum umboðar íslendsku fyritøkuna MT Bilar í Føroyum.

Ambulansan er ein Ford Econline frá 1997 við V10 motori við 350 hk, sum Vestmanna Sløkki- og Bjargingarfelag hevur keypt ístaðin fyri tann gamla Ford Transit frá 70-unum, sum ikki var tíðarhóskandi longur. Ein av orsøkunum til at bilurin hevur so stóran motor og er so kvikur, er at hann hevur koyrt sum ambulansa í Reykjavík, har hann serliga hevur verið brúktur í sambandi við hjartastopp o.l. Í Vestmanna skal bilurin, sum hevur ein børu til sjúklingar, mest brúkast til koyring við amboðum og brandmonnum.

Hjá MT Bilum á Ólafsfirði hava teir spesialiserað seg í at uppbyggja neyðsendarbilar sum t.d. brandbilar og ambulansur. Fyritøkan varð stovnað í 1989, og teir hava nýliga keypt ein 2500 fermetur stóran bygning afturat til endamálið. Í løtuni hava teir ein ordra inni frá Reyða Krossi í Íslandi upp á 10 ambulansir. Eisini uppbyggja teir ein Scania brandbil við 5000 litur pumpu til Akureyrar. Heimasíðan hjá MT Bilum er: www.mtbilar.is.



*Umboðsmaðurin hjá MT Bilum í Føroyum, Fríðálvur Bláhamar í Vestmanna, hevur nýliga keypt sær eina Honda GoldWing 1000 cc frá 1979 við 86 hk motori. Súkklan er úr Kalifornia, og er keypt gjøgnum MC-Garage í Åby í Danmark.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Mazda minst feilir



Í seinastu týsku ADAC AutoMarX kanningunum, við støði í ADAC-hjálp á týsku vegunum, liggja Mazda nú á odda við minst feilum. Toyota saman við Subaru eru nummar tvey

*Kelda: Motor Magasinet*

## Opel Zafira Hydro-Gen3




23 motorjournalistar frá 15 londum hava við góðum úrsliti koyrt ein túr upp á tilsamans 10.000 km frá Hammerfest í Noreg til Cabo Da Roca í Portugal við Opel Zafira Hydrogen3, brennikyknubilinum hjá General Motors

*Kelda: Motor Magasinet*

## Størri A-klassi



Mercedes-Benz eru komnir á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri bilur, ið fæst við 3 og 5 hurðum. Bilurin er 23 cm longri og 4,5 cm breiðari við 14,5 longri aksilfrástøðu.

*Kelda: Motor Magasinet*